# TILTØK

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking.Evni: Ódeyðiligleiki, ein gáva frá Gudi. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

### »Tíð til Gud«
Vit koma saman úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21. Evni: Kristus gevur spenning í lívið. Eisini fara vit at hyggja at vetrarskránni. Drekkamuður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útifundur. Sunnudagin kl. 11 og 18 møti. Elisabeth og Sámal Jákup Joensen leiða og tala.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 17.30 í Hoyvíkar skúla bøn og kl. 18 møti har Jón Joensen av Strondum talar. Øll eru vælkomin.

### Ebenezer
Fríggjakvøldið kl. 20: Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 10: breyðbróting, kl. 18: evangel. møti, kl. 21: útimøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18: møti við Regin Olsen.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/Ólavi Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti, útisetar skipa fyri, kl. 22 útimøti v/Evangeliihúsinum. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Hvítusunnusamkoman
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18: evangel. møti við dópi. Mánakvøldið kl. 20: bíbilog bønarmøti.

### Filadelfia, Sundalagi
Sunnudagin kl. 17 bønarmøti, kl. 18 kvøldmøti v/Preben Hansen.

### Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 19 við Dánjal Gaardlykke. Húsmøti verður týsdagin kl. 20 hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Møti verður sunnukvøldið kl. 19 við Derhard Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús v/ Jónfinn Olsen. Sunnukvøldið kl. 17 møti við Tinu og Max. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

### Soli Deo Gloria
Mikudagin kl. 6: Bøn, leygardagin kl. 9: bøn, sunnudagin kl. 18 møti, Asta Lydersen talar. Mánadagin kl. 20 : bønarmøti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Ragnar Ludvig og Jeannu Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Cafe One Way, Tvøroyri
Fríggjakvøldið kl. 21 luttaka Birgit og Niclas Thomsen úr Havn.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar. Mánakvøldið kl. 20 bønarfundur. Ónskvøldið kl. 20 uppbyggingarfundur.

### Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vági
Sunnudagin kl. 18 møti, Sigrid Ludvig og Eydna Beck luttaka. Øll eru vælkomin.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

### Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
*Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag kl. 14.00-18.00.* Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.

### Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 19. aug. verður gongutúrur niðan á Støðlafjall og Stórafjall, tó um viðrar verður farið niðan á Sneis. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilm.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

### Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn. Teldupostur: fhf@craft.fo Heimasíða: www.craft.fo Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er open í frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hæðd Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

## 90 ÁR
Í dag, 17. august verður Óluva Hansen, Tórshavn, 75 ár. Hon er burturstødd.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august. Tlf. 317373 · Fax 310813 e-mail: mbf@post.olivant.fo

### Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

### Lymføðemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

### Javni
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16. Tlf. 314827 · fax 310557 email: javni@post.olivant.fo

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir. Tlf./fax 312098 Teldupostur: far_cuba@hotmail.com Viðtala eftir avtalu.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

### Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419

### Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið
Postsmoga 1063 110 Tórshavn. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo Tlf. 315928, Odny Tlf. 315786, Karin Elisa Tlf. 315673, Katrin

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27. E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

### Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

### Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax.32586149 e-mail: kristnastova@get2net.dk Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

FARPACK



# FILMSTEIGURIN

## Pearl Harbor

Stórfilmurin »Pearl Harbor« sigur okkum frá um hendingarnar fyri, undir og eftir japanska álopið á flotabasan á Hawaii, sum trý vanlig ungfólk uppliva tað, tá tey á hendan hátt verða tikin við í eina av týdningarmestu hendingum heimsins.

Flogskipararnir, Rafe og Danny, eru bestu vinir. Rafe er tann mest útfarandi og tað eydnast honum at sjarmera sjúkrasystrina, Evelyn, og tey verða djúpt forelskað. Rafe velur at melda seg sum sjálvbodnan til Royal Air Force í Onglandi, og hetta skilir tey. Meðan Rafe stríðist í luftini yvir Onglandi, verða Danny og Evelyn flutt til Pearl Harbor, har teirra felags sorg mennir seg til kærleika, tá tey fáa deyðsboðini av Rafe.

Men Rafe livir kortini og kemur aftur. Innanhýsis spenningarnir mugu kortini víkja fyri ytru hendingunum, tá tey japansku Zero'arnir og bumbuflogførini spreiða deyða og oyðilegging tann 7. desember 1941. Danny og Rafe fara á flog og stríðast virðiliga í luftini, meðan Evelyn má klára seg, sum frægast, millum túsundavís av særdum og doyggjandi offrum. Álopið á Pearl Harbor var dagurin, tá USA misti tolið, og hetta var dagurin, tá seinni heimsbardagi eisini gjørdist bardagin hjá USA — og kríggið hjá Evelyn, Danny og Rafe…

Michael Bay hevur leikstjórnað. Leikarar eru Ben Affleck, Josh Hartnett og Kate Beckinsale





## One night at McCool's

Tað gekk hart fyri seg tað kvøldið á McCool's. Ein eitt sindur sjuskut bar – í skeiva endanum av býnum. Randy (Matt Dillon) arbeiðir sum barrvørður. Systkinabarnið, Carl (Paul Reiser) sum er advokatur, var har til tað stongdi. Dehling (John Goodman) sum er dedektivur, kom, tá morðið var framt. Var tað likið, sum var sambandið millum menninar? Nei, tað var nógv meira ein femme fatale, sum eisini var har tað kvøldið. Ein vøkur ung kvinna, sexut og eggjandi, lokkandi, sum ógvuliga hóskandi bar navnið Jewel (Liv Tyler).

Áðrenn náttin varð liðin, var hon tann einasta, teir tríggir menninir hugsaðu um. Hon flytti inn til ein teirra, fekk hin at gloyma livandi konu sína og tann triða at gloyma deyðu konu sína.

Ein klára løtu hugsar ein teirra: – Sex og harðskapur somu nátt – tað er eitt sindur nógv av tí góða…

Men fyri eina kvinnu sum Jewel var tað meira – nógv meira í væntu. Tað sum Jewel vildi hava, var meira enn teir kundu bjóða henna. Men so kom tann fjórði maðurin…

Tey leikandi eru Matt Dilon, Liv Tyler, Michael Douglas, Paul Reiser, John Goodmann, Tim deZam, Leo Rossi og Reba McEntire




**Billettprísur: 70,- kr.**

**Frumsýning**
Fríggjadagin 17.08. kl. $21^{30}$ Leygardagin 18.08. kl. $21^{30}$
Sunnudagin 19.08. kl. $21^{30}$

# HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆




Fríggjadagin 17.08. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 17.08. kl. $23^{30}$
Leygardagin 18.08. kl. $19^{00}$ Leygardagin 18.08. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 19.08. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 17.08. kl. $19^{15}$ Leygardagin 18.08. kl. $19^{15}$
Sunnudagin 19.08. kl. $19^{15}$




Fríggjadagin 17.08. kl. $21^{15}$ Leygardagin 18.08. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 19.08. kl. $20^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Kemur Fríggjadagin 24.08.**

**Sangen fra anden sal**
Fríggjadagin17.08. kl. $17^{00}$

**Italiensk for begyndere**
Leygardagin18.08. kl. $17^{00}$

**En sang for Martin**
Sunnudagin 19.08. kl. $17^{00}$

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola -
Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

**www.in.fo/havnarbio**